# AST AFTUR





## TÁRANDI PÍNA

*Ein hin kendasta myndin av einum grátandi Paul Gascoine eftir hálvfinalu ósigurin fyri týskarum í 1990.*







## STÓR SIGUR

*Enski knúsandi 5-1 sigurin á týskari jørð, er størsta tap hjá Týsklandi nakrantíð.*



## ENDURTØKA

*Aftur máttu eingilsmenn lúta fyri arvafíggindanum eftir brotsspørk. Gareth Southgate var syndabukkurin hesuferð*

millum Ongland og Týskland. 4. juli møttust liðini í HM-hálvfinaluna á Stadio delli Alpi í Torino. Andreas Brehme legði Týskland á odda, tá ein tími var farin. 20 minuttir seinni javnaði Gary Lineker fyri Ongland. Longda leiktíðin gav einki mál, og liðini máttu fyri fyrstu ferð í einum dysti landanna millum út í eina brotssparkskapping. Týskarar vóru eirindaleysir, og bumbaðu fýra av fýra brotsspørkum inn. Onglendingar brendu tvey av fimm brotsspørkum, so óneyðugt var við tí fimta týska brotssparkinum, sum teir uttan iva høvdu sett inn eisini. Chris Waddle og Stuart Pearce brendu fyri Ongland. Stuart Pearce rópti sína angist út í kvøldarmyrkrið í Torino, og Paul Gascoigne græt, sum var hann pískaður. Talan var um besta enska landsliðið, sum ikki hevur vunnið nakað.

### EM-hálvfinalan í 1996

Seks ár gingu og liðini møttust aftur á leikvøllinum á Wembley, har onglendingar 30 ár áðrenn við einum ivasamum máli høvdu søkt týskarar í HM-finaluni í 1966. Tann óseriøsa enska pressan megnaði at skapa eyka spenningar millum londini við at draga ein parelel millum hálvfinaluna og seinna heimsbardaga. »Let's blitz Fritz« og aðrar ørar yvirskriftir vóru við til at motivera tað týska liðið, sum sanniliga fekk sína hevnd. Aftaná vanliga leiktíð stóð á jøvnum 1-1. Alan Shearer legði Ongland á odda í triðja minutti, men bert 13 minuttir seinni javnaði Stefan Kuntz fyri Týskland. Eftir hetta spældu liðini 104 minuttir uttan, at hvørgin skoraði. So var aftur brotssparkskapping. Trygt og arrogant sendu týskararar øll í netið, meðan Gareth Southgate brendi fyri Ongland. Týskland hevði fingið hevnd fyri HM-finalutapið í 1966. Og fyri at gera ilt verri, so vunnu teir EM-finaluna á Kekkia á júst Wembley.

### 2000 og aftaná

17. juni í 2000 møttust liðini aftur í bólkaspælinum í EM-endaspælinum, sum var í Belgia og Hollandi. Ongland fekk hevnd fyri hálvfinalutapið í 1996 við einum 1-0 sigri. Alan Shearer skoraði einasti málið eftir 53 minuttir. Bæði liðini taptu ímóti Rumenia og Portugal í bólkaspælinum, og máttu nakkalang heim, aftaná innleiðandi dystirnar. Í HM-undankappingini í 2000 og 2001 vóru liðini í bólki saman, tá vann Týskland 1-0 á Wembley, meðan Ongland vann ein knúsandi 5-1 sigur í München, og stendur tann sigurin, sum eitt tað besta enska landsliðsavrikið nakrantíð. Týskarar hava vunnið tveir teir seinastu venjingardystirnar, sum vóru í 2007 og í 2008. Í báðum førum var talan um 2-1 sigur. Tað verður uttan iva dramatikkur, tá liðini møttast aftur sunnudagin. Onglendingar gera best í at avgera dystin, áðrenn brotssparkskappingin stendur fyri.



## VINARDYSTIR

*Ongland og Týskland hava síðan leikt tveir vinardystir, har týskarar hava vunni teir báar 2-1.*

heris@sosialurin.fo